# Almannamálaráðið

Dagfesting: 11. oktober 2019
Mál nr.: 19/00269
Málsviðgjørt: PL

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 3. ...**<br>*Stk. 2-3.* ...<br>*Stk. 4.* Fyritíðarpensjónistur, ið búsetir seg í Danmark ella í Grønlandi eftir at hava fingið tillutað fyritíðarpensjón, varðveitir rættin til fyritíðarpensjón, inntil endalig avgerð um fyritíðarpensjón ella annað varandi uppihaldsgrundarlag er tikin í Danmark ella í Grønlandi, tó í mesta lagi upp til 3 ár og treytað av, at viðkomandi ikki í Danmark ella í Grønlandi fær almannapensjón ella aðra almannaveiting til uppihalds. Almannaverkið kann taka avgerð um, at persónur, ið hevur fingið staðfest deyðiliga sjúku, og lekjandi viðgerðin er steðgað, kann varðveita rættin til fyritíðarpensjón longur enn 3 ár. Rætturin at | <br><br>**1.** § 3, stk. 4 verður strikað.<br><br>**2.** Aftaná § 3, men áðrenn yvirskriftina yvir § 4, verður sett:<br><br>“**§ 3 a**. Um ein borgari, ið hevur fingið tillutað fyritíðarpensjón eftir hesi lóg, flytir til Danmarkar ella Grønlands, hevur føroyski myndugleikin skyldu til at veita nøktandi upplýsingar til viðgerð av umsókn um fyritíðarpensjón í landinum, sum viðkomandi flytur til.<br>*Stk. 2.* Føroyski myndugleikin rindar kostnaðin av umseting av neyðugum skjølum. |

| | |
|---|---|
| taka fyritíðarpensjón sína við til Danmarkar og Grønlands fevnir ikki um gjald fyri aðrar tænastur ella veitingar, ið viðkomandi fær í ávikavist Danmark og Grønlandi. | **§ 3 b.** Um ein borgari, ið hevur fingið tillutað fyritíðarpensjón eftir hesi lóg, flytir til Danmarkar ella Grønlands, kann viðkomandi varðveita sína fyritíðarpensjón í upp til 12 mánaðir, hóast búsitandi í Danmark ella Grønlandi.<br>*Stk. 2.* 12 mánaða tíðarskeiðið sbrt. stk. 1 verður rokna at byrja frá 1. í mánaðinum eftir, at borgarin er fluttur.<br>*Stk. 3.* Tillutaða fyritíðarpensjónin skal ikki endurmetast ella broytast í tíðarskeiðinum nevnt í stk. 1.<br>*Stk. 4.* Um ein fluttur fyritíðarpensjónistur fær tillutaða fyritíðarpensjón ella aðra almannaveiting til uppihalds í Danmark ella Grønlandi innan teir fyrstu 12 mánaðirnar, fellur føroyska fyritíðarpensjónin burtur. Føroyska fyrtíðarpensjónin fellur burtur, tá fyritíðarpensjón ella onnur almannaveiting til uppihalds í Danmark ella í Grønlandi tekur við.<br><br>**§ 3 c.** Um ein borgari, ið hevur fingið tillutað fyritíðarpensjón í Danmark ella hægstu fyritíðarpensjón í Grønlandi, flytur til Føroyar, fær viðkomandi sjálvvirkandi tillutað hægstu fyritíðarpensjón sambært hesi lóg.<br>*Stk. 2.* Sjálvvirkandi tillutan av fyritíðarpensjón sambært stk. 1 er treytað av, at viðkomandi persónur lýkur treytirnar í kapittul 3 og 5 í hesi lóg.<br><br>**§ 3 d.** Persónur, ið vegna flyting til Danmarkar ella Grønlands fær tillutaða fyritíðarpensjón sambært teimum í Danmark og Grønlandi ásettu reglum hevur skyldu til at rinda aftur tað, ið viðkomandi fyri sama tíðarskeið hevur móttikið í fyritíðarpensjón úr Føroyum. |
| | **§ 2**<br><br>*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020.<br>*Stk. 2.* § 1 er ikki galdandi fyri persónar, ið eru fevndir av § 3, stk. 4, tá lógin kemur í gildi.<br>*Stk. 3.* Tó er § 1, nr. 2, § 3 a og § 3 d, galdandi fyri persónar, ið eru fluttir til |

| | |
|---|---|
| | Danmarkar ella Grønlands, og hava varðveitt rættin til lægstu ella miðal fyritíðarpensjón sambært § 3, stk. 4.<br>*Stk. 4.* Persónar, ið eru fluttir til Danmarkar ella Grønlands, og hava varðveitt rættin til hægstu fyritíðarpensjón sambært § 3, stk. 4, verða fevndir av reglunum um sjálvvirkandi tilluting av fyritíðarpensjón, samsvarandi § 3 c, sambært galdandi reglum í Danmark ella í Grønlandi. |